# við í Kuba









*Castro saman við aðalskrivaranum í sovjetiska kommunistaflokkinum, Nikita Khrushchev*

*Fulgencio Batista, forseti og seinni einaræðisharri á Kuba*

alsamt fleiir býum eru mótmælisgongur á nærum hvørjum degi. Í Santiago verður lokali leiðarin fyri 26. juli rørsluni, Frank Pais myrdur saman við Raul Pujol.

Duppultmorðið, sum er framt av Batista trúgvum løgregluliðum førir til risastórar mótmælisgongur og eitt aðalverkfall í Santiago. Herurin, sum higartil hevur stuðlað Batista ivast meir og meir, um forsetin er sín uppgávu vaksin. USA valdi at gevast at stuðla Batista í 1958. Umsitingin hjá Eisenhower, forseta byrjaði at innsíggja, at Batista ikki var tann besti hesturin hjá USA at seta peningin á.

## Síðsta royndin

Ì einari síðstu roynd at berja uppreistrarherin niður sendir Batista ein her uppá 12.000 hermenn fyri at berjast ímóti teimum uml. 2.500 uppreistrarmonnunum, sum halda til í Sierra Maestra fjøllunum.

Men manntalið verður útjavnað við at hermennirnir hjá Castro kennir fjøllini væl, meðan hermennirnir hjá Batista eru púra ókunnigir við fjallalendið í Sierra Maestra. Innan fáar dagar hevur herurin hjá Batista mist 126 mans, hernaðarovastin hjá Batista, Eulogio Cantillo tekur avgerð um, at taka alla hernaðarmegina aftur. Hetta hevur ringa ávirkan á moralin hjá hermonnunum, og nú stendur flestu fólkum greitt, at tað fer ikki at bera til hjá Batista at halda fast við valdið.

Batista-trúgvir hermenn royna at halda skansan kring Kuba, men teir hava ongan møguleika ímóti tí stóra fólkahavinum, sum uppreistrarmennirnir hava fingið við sær. Í november og desember í 1958 taka uppreistrarmennirnir allar teir stóru býirnar uttanfyri Havanna. Nýggjársaftan í 1958 læs Batista skriftina á vegginum. Hann pakkaði viðførið við nógvum útlendskum gjaldoyra, og rýmdi av landinum. Kl. 3 um náttina fer flogfarið hjá honum úr Kuba, og hann sá ongantíð Kuba aftur. Batista búsetti seg fyrst á Madeira, síðani í Estoril, sum liggur uttanfyri portugisiska høvuðsstaðin, Lissabon. Batista doyði 6. august í 1973 av einum hjartatilburði. Hetta hendi meðan hann var staddur í Marbella í Spania.

## Á sigursferð

Nýggjársdag í 1959 fór Fidel Castro eina sigursferð gjøgnum alt Kuba. Sigursferðin byrjaði í Santiago á eystursíðuni, og endaði í høvuðsstaðnum, Havanna á vestursíðuni. Castro og hansara menn innrættaðu sær høvuðsskrivstovuna á Hotel Hilton í Havanna. Teir lógu ikki á løtu síðuni, men fóru beinavegin í holt við at taka Batista-viðhaldsfólk av døgum.

Í samfull 50 ár hevur tað eydnast Fidel og Raul Castro at reka Kuba, sum ein marxistiskan einflokka-stat. Lagnunnar speisemi er, at í dag eru teir líka tvørir at seta í verk politiskar nýskipanir, sum Batista var tað í sínari tíð. Handilsstongsulin hjá USA er enn í gildi, men møguliga fer Barrack Obama at fremja eina broyting, livst so spyrst. Castro hevur tó síni viðhaldsfólk kring Heimin, og eru tað alsamt fleiri fólk, sum vitja Kuba. Nakað av marknaðarbúskapi er innførdur í Kuba, so onkur kamelur er svølgdur hesi 50 árini.

Fyri rættvísissakir skal eisini sigast, at skúlaskipanin og heilsuverkið hava verið tvær sólskinssøgur á Kuba hesi farnu 50 árini, og verða júst hesi bæði tingini ofta drigin fram av Castro-fjepparum. Millum kendastu Castro-fjepparnir er argentinski landsliðsvenjarin, Diego Armando Maradona, sum mangan hevur leitað sær heilsubót á Kuba.